# Breiða undirtøku fyri eftirskúlanum

**Hvalba: -** At nýggja samgongan hevur eftirskúlan í samgonguskjalinum, og andstøðan samstundis ætlar at leggja uppskot um eftirskúla fyri løgtingið, ber boð um, at eftirskúlin hevur breiða undirtøku í politisku skipanini, sigur Ólavur Rasmussen, sum er formaður í nevndini fyri eftirskúlan í Hvalba. Hann sigur sambært uf.fo, at uppskotið sum Fólkaflokkurin nú ætlar at leggja fyri løgtingið, er sama uppskotið sum ætlanin var at leggja fyri tingið, tá løgtingsval varð útskrivað. Uppskotið varð borið løgtingsskrivstovuni, men var ikki lagt fyri tingið, tí val varð útskrivað. Ólavur Rasmusen vil ikki alment gera viðmerkingar til uppskotið um eftirskúla, tí málið er politiskt, og tað eru politikararnir sum mugu taka avgerðina. Nevndin fer nú at biðja landsstýrið um ein fund, fyri at fáa at vita, hvørjar ætlanir landsstýrið hevur við eftirskúlanum.



# Fer nú á svart-kjaftaveiðu

Strømfjord fer komandi túr at royna eftir svartkjafti, skrivar heimasíðan bkv.fo. Upplýst verður, at á seinasta sildatúrinum fingu teir 900 tons av sild. Teir hava eina kvota uppá 6000 tons.

## Goymdar inntøkur

Vit spurdu eisini stjóran, hvussu eitt oljufelag, sum higartil ongar inntøkur hevur havt, kann hava eitt so stórt virði, sum Atlantic Petroleum hevur?

- Slíkt virksemi kann kanska samanberast við eitt alibrúk, sum enn ongan fisk hevur tikið. Fiskurin verður fóðraður, til hann er tøkuførur, men áðrenn hann verður tikin, gevur hann onga krónu. Kortini eru virðini har. Hjá okkum snýr tað seg um goymslur av olju, sum eru í undirgrundini, og her er tað eisini ein spurningur um tíð, nær hesar goymslur verða "umsettar" til pening.

Wilhelm vísir á, at tú kanst eiga nakrar dollarar, sum tú vekslar til krónur, og soleiðis kanst keypa fyri peningin.

- Hjá okkum snýr tað seg um eina "oljukonto", sum kann umsetast til pening, um vit so kunnu siga. So hvørt, sum útvinningin av oljuni fer fram, veksur í pengingakassanum hjá felagnum, samstundis sum goymslan, ið skapar pengingin, minkar. Tí er umráðandi, at goymslurnar verða suppleraðar við nýggjum goymslum.

## Olja fer at renna

Wilhelm Petersen vísir á, at tá ið framleiðslan í Chestnu- og Etrick-økjunum er komin í gongd í summar, verður parturin hjá Atlantic Petroleum millum 3.000 og 4.000 tunnur um dagin.

- Metingar siga, at tann fyrri brunnurin helst kemur at koyra í eini fimm ár og hin seinni í eini tíggju ár. Rímiliga stórar inntøkur liggja í okkara parti av hesi framleiðslu, sigur stjórin í Atlantic Petroleum.

Vanliga eru eini 3-4 feløg saman um at slíkar oljuverkætlanir, og hetta er fyri at spjaða váða og fyri at gera nýtslu av førleikanum hjá hvørjum øðrum.




*Nevndin í Atlantic Petroleum vitjaði fyrsta "føroyska" oljupallin í fjør heyst. Hetta er Sevan Hummingbird-pallurin, sum skal fáa fyrstu føroysku oljuna upp úr havbotninum og soleiðis geva Atlantic Petroleum fyrstu inntøkurnar*